Formansfrágreiðing 2018

Stóra føroyska meginfelagið við teimum 24 limafeløgum eitur MEGD, ið merkir megi og styrki, og leggur dent á møguleikar. Við búmerkinum, skrivað eitt sindur øðrvísi á ein viðarbul, viðurkenna vit, at lívið ikki er beint fram. Skapið á viðarbulinum er ikki ein fullkomin rundingur, tí vit møta avbjóðingum í lívinum, sum gera, at vit fara umvegir niður á næstu reglu - tað ger onki.

Saman við MEGD megna vit – tað merkir tó, at eitt miðvíst arbeiði skal her leggjast í. Seinasta árið hevur verið hendingaríkt, og um árið skuldi fingið eina yvirksrift, so hevði hon væl møguliga verið atkoma.

Atkoma til arbeiðsmarknaðin

1. mai skipaði Havnar Arbeiðarafelag fyri tiltaki á Vaglinum í Tórshavn, og fekk MEGD heiðurin at vera við millum røðararnar.

Millum annað varð í røðuni vístá, at í dag er vísindaligt grundarlag fyri at siga, at eitt gott arbeiðsumhvørvi hevur ávirkan bæði á likamliga og sálarliga heilsu og vælveru okkara. Hinvegin kann arbeiðsloysi vera skaðiligt, tí arbeiði hevur størsta týdningin, tá ið hugsað verður um at hava nøktandi fíggjarligar umstøður, sum eru neyðugar fyri sinnisliga vælveru og fult at kunna luttaka í dagsins samfelag. Arbeiði møtir nevniliga týdningarmiklum sálarligum tørvum hjá menniskjum og hevur eisini týdning fyri persónliga samleika, sosiala leiklut og status okkara.

Tí skal tað eisini vera vanligari enn tað er í dag at síggja borgarar við alskyns avbjóðingum á arbeiðsmarknaðinum.

Atkoma til egið heim

Í Ársfrágreiðing 2016 frá Bústøðum varð tosað við MEGD um Algilt snið øllum til góðar. Millum annað var har vístá, at tað snýr seg ikki um, hvør skal vera við, men at gera tað møguligt hjá øllum at vera við. Tí hevur tað stóran týdning, at ein byggiharri er víðskygdur, tá ið farið verður undir at byggja íbúðir.

Tey flestu okkara hava eitt ynski um at seta føtur undir egið borð. Og sambært ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, er hetta ein grundleggjandi rættur hjá okkum øllum. Vit eru ymisk og eiga at tryggja, at øll fáa egið heim - her er nakað á mál. Eisini við hugburði politiskt og umsitingarliga um, hvussu og hvar verður bygt.

Atkoma í ferðavinnu

Undir heitinum Access Vest-Norden 2017 var ráðstevna 19. mai í Norðurlandahúsinum. Her var bæði bóklingur og nýggj heimasíða um atkomuliga ferðavinnu fyri øll í Útnorðurøkinum løgd fram. Ása Olsen, aðalskrivari, varð við í arbeiðsbólkinum.

Í bóklinginum stendur m.a. at tryggja ferðafólkum í Útnorðurøkinum, Íslandi, Føroyum og Grønlandi, atkomu er ein stór avbjóðing, sum uttan iva fer at gera tað meira lokkandi og tryggari hjá øllum ferðafólkum at vitja, óansæð hvussu teirra likamligu førleikar eru.

Um hugsað verður um atkomuliga ferðavinnu, fer tað at gagna okkum øllum. Í hesum sambandi kann eg vísa á, at MEGD sendi út almenna áheitan til matstovur, kaffistovur, festivalar og tey, ið annars skipa fyri tiltøkum t.d. summarstevnum og ítróttartiltøkum at hugsa um ymisleika og ymiska tørvin fólk hava, og var MEGD á vitjan í Góðan morgun Føroyar at tosa um hetta. Her varð m.a. eisini víst á, at Strandfaraskip Landsins og Bygdaleiðir eiga at røkja sín part eins og kommunurnar eiga ein stóran part í, at atkoma verður tryggjað.

Atkoma í Kringvarpi Føroya

3. juli var aftur víst á avbjóðingarnar í, at Kringvarp Føroya ikki er fyri allar føroyingar. Vón okkara var, at tá ið teknmál varð viðurkent sum alment mál í Føroyum, at næsta stig bleiv at seta eina munandi, markaða upphædd á komandi fíggjarlóg at teksta sendingar í KvF. Bólkurin, ið hevur niðursetta hoyrn telur umleið 4-5.000 fólk. Hesi kunnu ikki fylgja við í tí, sum hendir í føroyska samfelagnum.

5. juli varð teknmál viðurkent á Føroya Løgtingi, og 9. november var teksting av sendingum viðgjørt á Føroya Løgtingi. Hóast fetini eru smá, so kunnu vit í dag gleðast um, at Dokumentarurin í KvF verður tekstaður, og Dagur og vika saman við 3-2 verða teknmálstulkað, og at Deyvafalagið hevur fingið lim í málráðið.

Atkoma á flogi

Á fundi á skrivstovuni hjá Atlantic Airways 30. august varð seravtala fyri fólk, ið hava rætt til fylgjarakort frá MEGD, undirskrivað. Avtalan merkir, at fylgjarin hjá tí ferðandi, sum hevur fylgjarakort, fær 50% í avsláttri av grundprísinum, tó ikki av ferða- og avgreiðslugjøldum, og øðrum serprísum.

Sum omanfyri er víst til, so er atkoma er ein stóra avbjóðing, sum framhaldandi fer at fylla nógv.

Eftirlønarlógin

MEGD hevur í fleiri ár arbeitt miðvíst mótvegis Almannamálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum fyri at fáa ráðini at gera broytingar í eftirlønarlógini soleiðis, at fólk, ið fáa útgjald frá Almannaverkinum, men hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin, fáa eftirløn av partinum frá Almannaverkinum.

Í nýggju lógini er tað gleðiliga hent, at eftirløn verður veitt av útgjaldi av øllum teimum skipanum, har fólk hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin uttan av lægstu og miðal fyritíðarpensjón.

MEGD var á fundi í Trivnaðarnevndini 6. mars, har heitt varð á Trivnaðarnevndina um at taka lægstu og miðal fyritíðarpensjónistar við, nú tey skulu gera álit áðrenn aðru viðgerð av uppskotinum.

Formansskapur í HNR og fundur í Føroyum

Í HNR - Handicaporganisationernes nordiska råd - hevur MEGD formansskapin. Føroyar hevur formansskapin í tvey ár, frá 2017-19. 12. september vóru vit saman við norðurlendsku meginfeløgini úr Norra, Svøríki, Finnlandi og Íslandi á fundi í Føroyum.

Á skránni var sum altíð Norden rundt, sum gevur londunum møguleika at siga, hvat meginfeløgini síðani seinast hava arbeitt við. Her legði MEGD dent á, at

- í Føroyum kunnu tunghoyrdum og deyv ikki fylgja við í føroyskum sendingum í KvF
- tørvur er á brekpolitiskari ætlan fyri Føroyar
- og eini menniskjarættindastova fyri at seta grein 33 í ST sáttmálanum í verk.

Vísst varð eisini til fund við landsstýriskvinnuna í Almannamálum um, hvussu vit kunnu arbeiða víðari við niðurstøðunum, sum komu út ST í 2014.

Altjóða brekdagur

3. desember í ár var Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í Heilsu- og innlendismálum, og Aksel V. Johannesen, løgmaður, gestir á altjóða brekdegnum og hugleiddu um inklusjón og lívsgóðsku frá einum politiskum sjónarhorni. Hesar hugleiðingar kunnu lesast á heimasíðuni megd.fo.

Danin Jacob Nossell, sum hevur lisið journalistik, hevði fyrilestur undir heitinum Inklusjón og lívsgóðska. Nossell er fjølbroyttur sum persónur og hevur verið virkin á fleiri ymiskum pallum, og er kendur í Danmark fyri at tosa opið og erliga um lív sítt við spastiskum lammilsi, ið vanliga verður kallað CP fyri cerebral parese.

Hetta vísti Nossel eisini í Løkshøll. Ein góður, øðrvísi, hugvekjandi, persónligur, eitt sindur provokerandi og stuttligur fyrilestur, har tey, sum vóru komin til tiltakið, fingu okkurt at hugsa um.

Nýtt navn og búmerki

Við hesum eru vit komin eitt ár longri á leið. Nakað er hent og nógv er eftir at gera. Nú, vit skulu liva upp til nýggja navnið, MEGD, so skulu vit komandi tíðina arbeiða miðvíst við at betra umstøðurnar hjá føroyingum.

Tað hevur verið bæði áhugavert og lívsjáttandi at fylja við tí, sum tit, limafeløgini, hava gjørt og sett í verk. Tykkara arbeiði liggur ikki eftir. Takk fyri tað!

Um vit nýta myndina, sum búmerki vísir á, so er MEGD bulurin, har greinarnar vaksa út. Eins og tað hevur týdning, at bulurin er sterkur, so verður træið einki træ, um greinarnar ikki eru vakurt grønar, vaksa og bera ávøkst. Somuleiðis er MEGD lítið uttan greinarnar, og mín vón er, at greinarnar komandi árið fara at súgva megd og megi úr meginbulinum øllum føroyingum til gagns.

At enda fari eg at ynskja okkum øllum hjartaliga tillukku við nýggja navninum og búmerkinum.

MEGD – saman megna vit.